## DAGSINS MEINING

# Minni sodavatn og bomm og fleiri rampur til brekað

Ferð eftir ferð verður sagt, at vit hava ongan politikk á hesum ella hasum økinum. Sjálvandi hava vit ein politikk, og ein játtan verður latin á fíggjarlógini til hetta ella hitt endamálið. Men tað, okkum ofta vantar, er ein heildarpolitikkur fyri ymisk málsøki. Og tá okkurt sansar at, spyrja vit, hvat er endamálið við hesum ella hasum. Tá er niðurstøðan, at vit hava ongan politik um henda ella handa samfelagstáttin.

Tí er tað at fegnast, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum í fleiri førum hevur sett sær fyri at orða ein heildarpolitikk. Longu tíðliga í ár boðaði Hans Pauli Strøm frá, at ætlanin er at orða ein heilsupolitikk, ein fólkaheilsupolitikk. Endaligi politikkurin er ikki orðaður, men fyri at staðfesta ætlanina var ein heilsurenning fyrr í heyst.

Harafturat eru fleiri ítøkilig ting sett í verk. T.d. er skotið upp at hækka avgjaldið á sodavatni, so tað verður dýrari. Tað er ein sannroynd, at børn og ung drekka alt ov nógv av hesum sukurvatninum, sum ikki er stimbrandi fyri heilsuna, um vit samanbera við mjólk. Men eftir øllum at døma er nógvur peningur at vinna at selja tað litaða og vælsmakkandi sukurvatnið, tí lýsingarnar eru nógvar bæði á skýggja og á blaðsíðunum.

At føroysku bryggjarí ´ini harmast um, at tey kanska fara at selja minni, er ein sjálvfylgja, men tey eiga eisini at vera tilvitandi um fólkaheilsuna. Bara spell, at so nógv verður innflutt av sodavatni. Hesin peningurin fer av landinum - til donsk bryggjarí. Henda spurningin áttu fólk kanska at verið tilvitandi um. Hóast tað er "in" at drekka sodavatn, er einki at ivast í, at vatn-automatirnar við køldum vatni eru eitt stórt framstig. Vætu skulu vit jú hava.

Umframt sodavatn er kosturin hjá nógvum børnum og ungum í dag kips og søtmeti. Spurningurin er, um sjokolátavørur ikki eru í so bíligar, um vit samanbera við heilsugóðu fruktina. Í kjalarvørrinum frá ósunna leskimatinum, og tí ósunna liviháttinum hjá mongum, fáa vit fyrst nøkur ov feit børn og ung og seinri koma so allar vælferðarsjúkurnar, sum kosta tí einstaka og samfelagnum dýrt. Tí er ætlanin við einum fruktátaki eit stórt stig rætta vegin.

Men hugsjónin hjá landsstýrismanninum røkkur viðari og í síðstu viku varð boðað frá einum heildarpolitikki um viðurskifti hjá teimum brekaðu. Serliga vit atliti til, hvussu tey kunnu røra og flyta seg í førosyka samfelagnum.

Hóast tað er ein fjórðingsøld síðani vit høvdu "ár teirra brekaðu" er enn langt á mál. Bara tað, at vit enn ikki hava fingið í almennu byggisamtyktina, at øll - likamikið førleika - skulu hava atgongd til almennar bygningar og almenn verkløg, vísir eina skammiliga, samfelagsliga líkasælu. Ikki tí, málið er ofta umrøtt, og tað er meira enn 20 ár síðani, at Javnaðarflokkurin samtykti á landsfundi, at slíkar ásetingar skuldu koma í almennu byggisamtyktina. Men nú ætlar landsstýrismaðurin og umsiting hansara at fremja orðini í verki, og tað skulu tey fáa eitt herðaklapp fyri. Gott, at onkur enn hevur hugsjónir í hesi hugsjónarleysu tíð!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hoyvíkar kirkja

**Frits Johannesen**



Nú hevur verið umrøtt í miðlunum, at byggjast skal nýggja kirkja í Hoyvík. Fólk í Hoyvík og tey, sum varða av hesi bygging, hava óivað sagt sína hugsan um hesa gongd.

Seinastu 20 árini eru tríggjar nýggjar kirkjur reistar í Føroyum - Fuglafjarðar kirkja, Gøtu kirkja og Fríðríkskirkjan. Hesar kirkjur eru hvør vakrari enn onnur bæði uttan og innan. Einki ilt um tað, men eitt sindur merkiligt er tað, tá ið hugsað verður um skap og siðvenju. Uttan eru tær ikki tráð við føroyskan kirkjuligan byggisið, men kemur tú inn í kirkjunar, so eru tær í ætt við ta gomlu siðvenjuna, har skipið - kirkjuskipið er bygt eftir tí elligamla skapinum basilica, sum merkir "kongalig høll".

### Basilica - kirkjan

Tá ið Konstantin keisari í árinum 323 eft. Kr. føðing gjørdi kristindómin til statsreligión, var ein av trupulleikunum hjá honum, hvussu samkomuhúsini (kirkjurnar) skuldu síggja út. Meðan søkt varð at teimum kristnu, bar ikki til at reisa høllir til guðsdyrkanina. Tey hølini, sum nýtt vórðu til guðstænastur, sóu lítið út í manna eygum. Ei heldur tey gomlu templini kundu brúkast til hetta endamál, tí al oftast var bert eitt lítið rúm til ta heidnu guðamyndina. (okkurt undantak er) Processiónir og guðstænastur fóru fram uttandura, tí vóru kirkjunar ikki gjørdar eftir teimum gomlu templunum, men eftir basilicaskapinum. Basilican varð brúkt sum søluhøll og rættarsalur. Dómarin ella tann, sum leiddi rættargongdini, sat við endan í hesum skála í tí hálvrunda skapinum, sum vit rópa fyri apsis. Hetta bleiv altarið í kirkjuni, so øll eygu kundu venda sær tann vegin, og seinni bleiv hesin parturin kallaður fyri kórið. Í høvuðshøllini kom fólkið saman og fekk hetta navnið høvuðsskipið, meðan tey minnu rúmini við síðuna av høvuðsbygninginum fingu navnið síðuskipini. Hetta er í stuttum, tann siðvenja, ið hevur verið brúkt í fleiri hundrað ár til kirkjubygningar. Móðir Konstantin keisara innrættaði eina slíka basilicu til eina stórkirkju, og frá hesi tí er orðið varðveitt um slíkar bygningar víða um. Eingin av teimum fyrstu basilikakirkjunum eru varðveittar í sínum upprunа, men hóast broytingar og endurbyggingar, kunnu vit gera okkum eina ímynd av, hvussu hesar kirkjur hava sæð út.

### Áheitan

Tað, sum liggur mær upp á hjartað í samband við ta nýggju kirkjuna í Hoyvík, er at fáa eitt øðrvísi kirkjurúm, har orglið er sett frammi í kór, og at her verður gott pláss fyri kór - og orkesturvirksemi. Í míni hugaverð tykist tað eitt sindur løgið, at arkitektar, tá ið teir skulu tekna eina kirkju, skulu halda fast við eina siðvenju innan, sum er uml. 1500 ára gomul og hava fríari ræsir uttan. Hetta undrar meg. Hví kunnu vit ikki fáa eina øðrvísi gongd, so tónleikur og sálmasangur fær betri kor innan kirkjugátt? Nú havi eg verið kórleiðari í eini 25 ár og verið fleiri ferðir uttanlands á kórferð og sungið í mongum kirkjum kring Norðanlond. Tá ið vit høvdu ogulfylgisspæl til okkurt kórlag og komið varð í eina kirkju, har orglið stóð frammi í kór, var tað eitt spæl, at fáa kór og orglið at fylgjast, men tá ið einir 10 til 15 metrar, og kanska longri var millum kór og orglið uppi á pulpiturinum, var tað torført at fáa orglið og kórið at sampakka. Hetta er eisini galdandi fyri kirkjur í Føroyum, tá ið henda uppstilling verður gjørd. Mín inniliga áheitan á mynduleikarnar, sum avgera hvussu kirkjurúmið skal verða: Gott í tykkum, setið orglið frammi í kór og gerið gott pláss fyri musikalskum virksemi í kórinum!

Tað finst so nógvur vakur tónleikur fyri kór, orkestur og orgul, solosangur og soloinstrument við orgulfylgisspæli o. s. fr. Alt hetta er kirkjuligur tónleikur. Hví ikki veita hesum tær bestu sømdir, ið hugsast kunnu, so vit hava eina kirkju í Føroyum, sum kann lúka hesar treytir? Hetta hevði verið okkum øllum til mikla tign og æru, og tað hevði vunnið sóma manna millum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.